Skjal 7

# Heilafelagið

**Felagið fyri apopleksi - og afasirakt**
**Íslandsvegur 10 c.**
**FO - 100 Tórshavn**
heilaf@olivant.fo

**Til Almannamálaráði**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

Nólsoy 14.9.2018

# Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) v.fl.

**Hoyringssvar frá Heilafelagnum í samband við uppskot til føroyaska Vælferðarlóg**

Heilafelagið fegnast um, at lóg verður smíðað, ið staðfestir tørvin á veitingum, sum eru alneyðugar hjá fólki ið bera brek, eisini hjá teimum ið fáa seinheilaskaða. Vit fegnast um, at støðið verður tikið í ST sáttmálunum fyri fólk ið bera brek og Evropeiska mannarættindasáttmálanum og positivu intentióninum í hesum sáttmálum.

Limirnir hjá Heilafelagnum hava nærum allir tørv á langvarugari rehabilitering, og venjing sum kann strekkja seg yvir fleiri ár, ja restina av lívinum. Nakrir borgarar hava tørv á lættari rehabilitering, og aðrir á specialiseraðum tilboðið við nógvum ymiskum specialistum. Avbjóðingarnar kunnu verða nógvar, kognitivar, sálarligar, sosialar, fíggjarligar og likamligar. Likamligu avbjóðingarnar kunnu vera: tarnað rørslulag, etingar- og andingartrupulleikar, talu-, hoyri- og sjóntrupuleikar v.fl. Sosialu trupulleikanir fevna eitt nú um hjúnarskilnað, einsemi, depresjón, apati og alkoholismu.

Avleiðingarnar av skaðunum kunnu vera alt frá løttum skaðum til álvarsamt mein. Viðgerðin kann vera kompleks. Deyðiligheitin er stór og konsikvensirnir av tarninum nógvir. Avleiðingar fyri familjuna eru ofta alstórir. Avgerandi fyri heilaskødd er, at rehabiliteringin byrjar so tíðliga sum gjørligt, og heldur á til besta úrtslit er nátt. Eftirfylgjandi støðug eftirmeting og dagføring av tørvi.

Fyri okkum sum felag, er altavgerandi, at rehabiliteringingsrætturin verður staðfestur við lóg. At nágreinað verður millum endurvenjing, rehabilitering og viðlíkahaldsviðgerð. Avgerandi er, at tørvurin hjá tí einstaka borgaranum verður staðfestur av specialistum, so avgerast kann, hvørja tænastu borgarin hevur tørv á. Alneyðugt er, at hesi tilboð finnast á nóg høgum støði/specialiseraðum støði og verða veitt eftir tørvi hjá tí einstaka. Øll viðgerð eigur at vera ókeypis

fyri borgaran og tey avvarðandi. Tad er ikki nóg mikið at fáa eitt avmarkað tilboð ella at skula luttaka í bólki.

Vælferðarlógin er ein rammulóg, sum ikki tryggjar borgarum viðgerð ella eftirviðgerð. Heldur ikki tryggjar hon, at tey við specialitørvi, fleiri ár framyvir, fáa rætta tilboðið, hetta tí at tilboðini ofta eru avmarkaði og ov smá og fleiri eru tey í detta niður ímillum. Vit vita um limir undir 67 ár sum rinda fyri sínar venjingar sjálvi. Lógin eigur at tryggja øllum við seinheilaskaða neyðugu viðgerðina og ikki bert at vera eitt politiskt amboð sum kann veitast einum borgara.

Eftir fasu 1 og 2 í rehabiliteringsuppdeilingini, tá borgarin skal útaftur í lívið, kemur tørvurin á stuðlum, bústøðum, húsaumbyggingum, vardum størvum og møguligari umskúling ella luttøku í øðrum frítíðarvirksemi, evt. dagtilhaldi ella umlætting. Sera umráðandi er, at borgarin kemur hartil, at hendan luttøka er møgulig, tí eru hesar tænastur/ekspertisur eisini umráðandi. Eftir lokna rehabilitering verður síðani tørvur á viðlíkahaldsviðgerð til teirra, sum hava tørv á tí. Tørvur kann verða á ymsum tilboðum av bústøðum. Hesir kunnu vera ellisheim (yvir 67 ár), egið heim (møguliga við umbyggingum), íbúðir í nøkta tørvin til fólk við seinheilaskaða, vardir bústaðir, viðgerðarstovnar til fólk í ymsum aldri, har borgarin búleikast í 1-3 ár, til tess at kanna veruliga framtíðartørvin.

Tað er umráðandi, at kommunurnar og Almannaverkið skipa seg soleiðis, at tey hava hesi tilboð. Um Almannaverkið og kommunur ikki megna at geva borgarum hesi tilboð, má samstarv og møguleiki verða fyri, at keypa sær tænastur frá hvørjum øðrum. Heilafeligið metir ikki, at yngri borgarar skulu húsast á ellisheimi, uttan so, at borgarin sjálvur ynskir hetta. Lógarverkið eigur at tryggja, at hendan paragraffin ikki verður misbrúkt. Lógin eigur at staðfesta, at Almannamálaráðið skal bygga fleiri egnaðar bústaðir til eitt nú fólk við seinheilaskaða, kring tær størru kommunurnar.

Tað hevur í alt ov nógv ár verið tørvur á tilboðum sum venjing, rehabilitering og viðlíkahaldsvenjing, uttan at politikarar hava raðfest hesi tilboð.

Lógin leggur upp til, at tað er frítt hjá Almannaverkinum og kommununum at raðfesta hesi tilboð innanfyri játtuanarkarmin. Hetta vil viðføra ymisleika á tilboðum og kvaliteti, og kanska enda við, at borgarin einki tilboð fær. Umráðandi er, at borgarin veit hvørja tænastu hann eigur at fáa, og hevur rætt til, og eigur hetta at verða lógarfest og nágreinað. Um tilboð eru, sum borgarin við tørvi ikki fær atgongd til, vil hetta økja um mistrivnaðin hjá borgaranum.

Eftir lokna viðgerð hava okkara limir stóran tørv á at fáa fyribyrgjandi viðlíkahaldsvenjing og má hesin rættur eisini tryggjast við lóg. Heilafelagið heldur tað vera løgi at tað er munur á viðlíkahaldsviðgerð sum kommunur og Almannaverk skulu veita. Viðlíkahaldsvenjing eigur at verða veitt til øll í hava tørv, óansæð aldur. Borgarar ið ikki sjálvir megna at venja, ella skulu vegleiðast neyvt, hava tørv á alt frá aktivari til passivari viðlíkahaldsvenjing. Tástani fyribyrgja vit veruliga seinskaðum, sum kosta borgara, teim avvarðandi og samfelagnum dýrt.

Umráðandi er at viðgerðartørvurin verður fult nøktaður í øllum rehabiliteringsfasum, soleiðis at virkisførið hjá tí raktað verður so gott sum gjørligt. Tástani fær borgarin við seinheilaskaða, familjan og samfelagið ágóðan av virknaðinum av brúkta peninginum.

Góðskan av tilboðnum er av alstórum týdningi, annars er vandi fyri, at arbeiðið sum er gjørt frammanundan fer fyri skeyti, og ágóði ikki fæst av brúkta peninginum og førleikunum. Serligur tørvur krevur servitan, royndir og røttu serfrøðingarnar, røttu hjálpartólini og røttu bústaðirnar.

Umráðandi er, at fólk fáa tilboð um bústað, dagtilhald v.m., saman við líkastillaðum, har tey sum eru kognitivt væl fyri, ikki verða blandað saman við tey ið eru eitt nú dement, menningartarnaði ella sálarsjúk. Kognitivir skaðar krevja serligar umstøður, eitt nú frið, serligar skipanir v.m. Dømi um borgarar, sum kunnu verða kognitiv skæddir, er Sclerose, Apopleksi og Parkinson.

Í lógartekstinum eru nevndir borgarar, ið hava *týðandi sálarligar, likamligar, ella víttfevndar socialar trupuleikar*. Eisini verður nevnt *varandi sjúka sum er progressiv og degenererandi.* Ikki er tilskilað, hvat hetta eru fyri trupulleikar, brek ella hvørjar sjúkur talan er um. Hetta eigur at vera nágreiðnað.

Greinað eigur at verða, hvørjar tænastur verða veittar í Føroyum og hvørjir av okkara limum eiga at fáa viðgerð uttanlands. Hetta arbeiði eigur politiski myndugleikin fáa nágreina beinanveg. *Víst verður til viðmerkingar frá Heilafelagnum til lóg um avtøku av visitatiónsnevnd.*

**Tilmæli frá Heilafelagnum:**
Greinast skal, hvat munurin millum endurvenjing og rehabilitering er og hvørjir sjúklingabólkar eiga at fáa tilboð um rehabilitering

- Rætturin til rehabiltering skal tryggjast við lóg
- Rætturin til viðlíkahaldsvenjing skal tryggjast við lóg
- Tørvurin hjá tí einstaka borgaranum skal kannast/greinast. Hetta skal tryggjast í endurvenjingarætlanini, sum er skrivað av specialistum innan ymsik fakøki. Tað skal standa í endurvenjingarætlanini hvat prognosan er, og hvat viðgerðartyngdin krevur. Hendan skal eisini fylgjast av stovni/fyriskipan sum borgarin verður visiteraður til uttanfyri sjúkrahúsið
- Nágreinast skal hvussu tilboðini uttanfyri sjúkrahúsini skulu byggjast út og raðfestast
- Møguleiki skal verða at keypa tænastur yvir um geirar, óansæð um talan er um røkt, viðgerð, dagtilhald ella bústað
- Avgerast skal, hvørjir sjúklingar hava tørv á tænastum uttanlands
- Allir borgarar við breki skulu verða javnt settir fíggjarliga, t.v.s. **einki brúkaragjald** skal vera á neyðugum viðgerðatilboðum
- Borgarin setir sjálv/ur málini fyri, hvat er umráðandi fyri seg og hvørji ynskir hon/hann hevur fyri lívð og framtíðina
- Borgarar við serligum rehabiliteringstørvi verða savnaði, so expertisan verður so stór sum gjørligt. Hesir stovnar skulu lúka neyðug og ásett faklig krøv
- Tilboðini, sum verða boðin út, skulu verða løtt atkomulig fyri borgaran, tí er ókeypis koyring til og frá neyðug fyri tey ið hava hendan tørv
- Specialstovnar skulu setast á stovn
- Nágeiðnast skal týðuliga hvat borgarin hevur rætt til og hvar hann kann kæra manglandi tilboð
- Løgtingið skal raðfesta hesa viðgerð høgt, tí mennsikjaliga og fíggjarliga eru nógvir pengar at spara við rættari og neyðugari rehabilitering, endurvenjing og viðgerð av fólki við seinheilaskaða og teirra avvarðandi

- Ein óheft viðgerðarnevnd skal avgera kærumál og eitt regluligt og óheft eftirlit skal tryggja at henda lóg verður hildin til fullnar

**Viðvíkjandi Heimatænastu – viðmerkingar frá einum limi**
Almannamálaráðið verður biðið um, at hyggja nærri at lóginai um gjald fyri heimahjálp, sum borgarar undir 67 ár fáa frá kommununum.

Tá ein partur kemur til skaða og gerst avlamin, og ikki kann gerða mat, dustsúgva, vaska gólv og klæðir, feiga tún, sláa gras, mála og alt annað, má makin gera alt. Og í nógvum førum eisini gerða ein stóran part av tíð, sum Alamannaverkið skuldi gjørt.

Í nógvum førum, blívur uppgávan ov stór og tað endar við hjúnabandsskilnaði. Tað er ikki rættvíst, at tann fríski, fyrst blívur trektur í skatti, so má hann/hon eisini gjalda fyri hjálp til makan.

Í nógvum førum tekur makin, hjá teimum rørslutarnaðu eisini náttarvaktir, uttan løn, sum Almannaverkið annars eigur, at seta stuðulsfólk/hjálparar til.

§12 Samsýning fyri at ansa borgara heima skal ikki einans verða galdandi vegna fólkapensjonistar ella tey við serligari sjúku. Hetta eigur eisini at vera gjørligt hjá avvarðandi hjá eitt nú seinheilaskaddum, ið ikki eru liðugt viðgjørd ella ikki hava fingið tilboð um bústað ella skipaða umlætting

**Bústaðir til fólk við seinheilaskaða**
Tað er av alstórum týdningi at bústaðir til fólk við seinheilaskaða verða bygdir skjótast gjørligt. Hesir bústaðir eiga at taka støði í tørvinum hjá tí einstaka borgaranum.

Um borgari við seinheilaskaða fær tillutað pláss á røktar- ella ellisheimi hjá kommununum, er tað av alstórum týdningi at borgarin sjálvur og avvarðandi ynskja hesa loysn. Víst verður til rættin at velja hvar ein ynskir at búgva.

Tað hevur stóran týdning at fólk við seinheilaskaða ikki verða flutt inn í bústaðir við øðrum málbólkum, har tey ikki kenna at hoyra heima. Hugsast skal eisini um støðuna hjá borgaranum við seinheilaskaða undan skaðanum og hvørji atlit eiga at vera tikin, eitt nú til møgulig børn og maka, livihátt og vanar sum heild.

Heilafelagið kennir til fleiri átrokandi mál um bústað dtil fólk við seinheilaskaða og heitir felagið tí á landsstýriskvinnuna um at skipa fyri at hesin tørvur verður nøktaður skjótast til ber. Tað er okkum kunnugt at familjur upploysast og at hjúnarskilnaður stendst av manglandi tilboðum til fólk við seinheilaskaða. Eisini eru dømi um børn, sum ikki ynskja at búgva heima longur tí annað foreldrið er so nógv broytt og at tey ikki kenna seg trygg við viðkomandi og broyttu umstøðurnar og hava trupult at skilja broyttu persónsmenskuna.

Sum ískoyti til tørvin av manglandi bústaðartilboðum til fólk vi seinheilaskaða verður víst á, at uppskotið leggur upp til ein skilnað millum heimatænastu og stuðul. Tað eigur at vera tikið altit til einstaka persónin og hvørt viðkomandi kennur seg tryggan við tann peron sum skal hjálpa viðkomandi. Um neyðugt, so eigur tað at bera til at fáa alla hjálp frá sama persóni. Tó skal

sosialpedagogiska arbeiðið hjá faklærdum virðast sum eitt fakøki fyri seg, har málrættað útbúgving liggur aftanfyri tað at vera stuðul. Stuðul eigur ongantíð at verða veittur frá fólki ið er undir 18 ár.

Fólk, ið búgva í egnum bústaði og hava tørv á víðfevndari hjáp í gerandisdegnum eiga at fáa røttu hjálpina frá fakfólki og eigur hetta ikki at áliggja avvarðandi, oftast maka og børnum at átaka sær hesar uppgávur. Makin, sum sjálvandi er nærmast, hevur tørv á at taka hond um sítt egna lív og arbeiðslív eisini, umframt at taka sær enn meira av familjuni og praktiskum uppgávum. Tað sæst tíverri ov ofta, at maki og børn bukka undir fyri arbeiðsbyrðuni og broyttu umstøðunum í heiminum. Hetta eigur at verða loftað av almenna myndugleikanum og tí/teimum ráðgevarum ið borgarin hevur at stuðla sær.

Generelt er tað ein støða hjá avvarðandi at limum við seinheilaskaða, at tey ofta eru ovbyrjaði av stóra trýstinum sum skaðin og broytta lívsstøðan hevur við sær. Tað eru tøl ið vísa, at avvarðandi oftari verða strongd og í vanda fyri álvarsligari sjúku, herudnir eisini tunglyndi og isolatión. Í Føroyum er ongar skipanir fyri børn hjá borgarum við seinheilaskaða og hava hesi stóran tørv á einum netverki har tey kunnu tosa við onnur, eisini fakfólk, um broyttu lívsstøðuna og hvussu tey skulu skilja sín egna leiklut í familjuni.

Í summar vóru vit fyri tí átaluverdu og mannminkandi støðu, at stuðulstímar til fólki við víttfevndum tørvi á hjálp og stuðli vóru skerdir vegna summarfrí í Almannaverkinum. Tann sum er raktur av seinheilaskaða er ongantíð í summarfrí frá sínum skaða, og hevur ikki minni tørv á stuðli um summarið. Hetta er átaluvert og eigur ongantíð at koma fyri og als ikki sum ein generell fíggjarlig sparing í summarfrítíðini hjá einum stovni undir Almannamálaráðnum. Skal talan vera um eina skerjing í stuðli/stuðulstímum, eigur tað at vera tí tørvurin hjá tí einstaka borgaranum er broyttur í styttri ella longri tíð. Tá eigur hetta at vera ein felags meting sum er avtalað millum borgara og stuðul.

Tað má ongantíð aftur koma fyri at limir í Heilafelagnum kenna seg so illa viðfarin, at tey mugu standa alment framm og vísa á eymu støðuna tey ella teirra avvarðandi eru í. Heilafelagið metir hetta at vera brot á skyldur hjá tí almenna móti borgaranum.

**Tvingsul og sjálvavgerðarrættur**
Spurningur: Hvat merkir *týðandi sálarligur virkisførleiki?*

Tídningarmikið er, at starvsfólk eru kunnaði um ST sáttmálan og kenna greinarnar og skilja ásetingarnar um hvat sjálvsavgerðarrættur merkir í ytstu meining.

Borgari sum býr á stovni hjá eitt nú landi ella kommunu, skal vera vardur fyri tvingsli og álopi á sjálvsavgerðarrættin av øllum slagi. Sovorið sum niðrandi tala yvir høvdið á viðkomandi og happing eigur ikki at koma fyri og skal fyribyrgjast.

Eitt nú eigur mistanki um ella framdur kynsligur ágangur móti borgarum at fráboðast alt fyri eitt og tað skal vera púra greitt hvussu ein fráboðar tílíkt. Eisini eigur arbeiðið at vera skipað á ein sovornan hátt, at vandin er minimalur fyri at tílíkur ágangur kann fara fram. Tað eigur ikki at ganga ov long tíð ímillum brúk av tvingsul og fráboðanir.

Tað er eisini týdningarmikið at starvsfólk ikki eru einsamøll til arbeiðis, bæði fyri at stuðla hvør øðrum og til tess at óynsktur tvingsul ikki kann koma fyri.

Tað er týdningarmikið at starvsfólk verða debriefaði og fáa bjóðað hjálp eftir harðskapsstøður og aðrar traumatiskar støður.

Fráboðanarskipan skal umhugsast og skal til eina og hvørja tíð verja bæði borgaran, ið fær hjálp og starvsfólkið sum er til arbeiðis.

Hetta er ein avbera týdningarmikil lógarpartur og eigur at vera kunngjørdur á ein hátt har bæði barnið og borgarin við *týðandi sálarligum virkistarni* skilir hann (ella hevur møguleika at fráboða møgulig brot) og soleiðis at starvsfólk kenna týdningin av honum.

Báðir partar eiga at vera vardir.

**Samanumtøka**

Vælferðarlógin eigur at vera sett í gildið við teirri intensjón at borgarar verða vardir fyri at missa sjálvræði og til tess at seta á stovn dygdargóðar skipanir, ið bøta um avleiðingar av skaða, sjúku, elli ella breki.

Av tí heitið seinheilaskaði so ofta er nevnt í hesum uppskoti til lóggávu fáa vit tann tanka, at ein vælferðarlóg eigur at fevna um allar borgarar í Føroyum og eigur ikki at vera ein lóg, ið fevnir um ein ella ávísar positivt nevndar samfelagsbólkar. Helst ber hetta brá av, at politiska skipanin ikki er komin á mál við teirra ætlanum um eitt nú at byggja bústaðir til fólk við seinheilaskaða, ella at skipa eina munagóða heimatænastu, endurvenjing ella rehabilitering fyri henda málbólk. Átrokandi tørvurin á áðurnevnda samfelagsbólki eigur at vera loystur alt fyri eitt, tí tørvurin er akuttur og hevur álvarsligar avleiðingar fyri familjur og einstaklingar.

Reint menniskjaliga eigur talan at vera um eina lóggávu, ið tryggjar borgarans rætt til tænastur, og ikki ein møguleika hjá landsstýrisfólki at seta í verk skipanir. Borgarans tørvur á hjálp, stuðli og viðgerð eigur at vera í miðdeplinum.

Búskaparliga eru kanningar gjørdar, ið greitt vísa á at røtt, rættstudis og miðvís hjálp gevur ein búskaparvøkstur heldur enn, sum ofta verður tosað um, at tað er ein samfelagslig byrða at fólk liva longri og liva við eitt nú víðfevndum tarni og at borgarar hava rætt til inklusjón og sjálvavgerðarætt.

SAFE ið er Evropiski felagskapurin fyri fólk ið hava yvirlivað slagtilburð og onnur við seinheilaskaða hevur í 2017 givið út eina stóra granskingarrapport. Sí leinkju til kanningina *The Burdon of Stroke* her: https://strokeeurope.eu/

Heilafelagið leggur dent á at tað er týdningarmikið at tað er alaðráðið og landsstýrisfólkið ið hevur ábyrgd av at fáa øll omanfyri viðurskifti uppá pláss. Tað eigur ikki at vera upp til Almannaverkið at taka politiskar avgerðir, AV er ein stovnur undir Almannamálaráðnum og er ikki ein politiskur aktørur.

Heilafelagið leggur seg at viðmerkingunum frá MEGD og tilskilar sær rættin at koma við fleiri viðmerkingum ella rættingum, um tað eru viðurskifti vit hava yvirsæð ella misskilt. Eisini orsaka vit stavivillur og annað sum stendst av arbeiðstrýstinum.

Landsstýriskvinnan segði í Kringvarpinum, at ríkiliga long tíð var latin at gera viðmerkingar, men til hetta vilja vit gera vart við, at uppskotið var sent út í hægstu summarfrítíð (24. juli) og at tað tískil er torført at savna partarnar um eitt so rúgvismikið tilfar.

Vit koma fegin við útdýpandi viðmerkingum ella frágreiðingum um tørvur er á tí.

Vegna Heilafelagið

Vinaliga

Maud Wang Hansen
Forkvinna